Prixið er í ár skipað við fýra innleiðandi kappingum, har tveir bólkar koma víðari til eina hálvfinalu. Frá hálvfinaluni verða tríggir bólkar valdir til finaluna í Prixnum, sum verður partur av nýggja tiltakinum, Atlantic Music Event. Øll tey innleiðandi umførini verða í Fuglafirði, hálvfinalan verður á Tvøroyri og finalan í Norðurlandahúsinum í Havn.

**1. umfar, 4. feb. kl. 20.00**
Go Go Blues · Paradox
Dimmi · SIC · DejaVu
Lama Sea

**2. umfar, 12. februar**
Ph 5,5. · Side Effect
All that Rain · Makrel
Róp · MMM

**3. umfar, 26. februar**
Eyðun Nolsøe · Lawetz
ROK · Direct Level
Frostbit · India

**4. umfar, 5. mars**
Braquet
Kristleif Zachariasen
Synarchy · EGR2PLZ
Terji Rasmussen Band
onkikanndiskuterast.altkann

**Hálvfinala, 2. apríl**
Í hálvfinaluni verða tveir teir bestu bólkarnir frá hvørjum innleiðandi umfari. Burtur úr teimum átta bólkunum, skulu tríggir teir bestu veljast til finaluna.

**Finala, 23. apríl**
Finalan í Prixnum verður partur av galla-tiltakinum, sum verður kallað Atlantic Music Event. Tríggir bólkar kappast um endaliga sigurin í Prixnum. Umframt finaluna verða aðrar tónleikaframførslur eisini.

**Nýggir sangir**
Í øllum teimum innleiðandi umførunum verður spælitíðin í mesta lagi 20 minuttir og í minsta lagi 15 minuttir. Tveir triðingar av spælitíðini skulu bólkarnir spæla sangir, sum ikki eru givnir út áður.

**Ferðasamband**
Bussar koyra í sambandi við øll tey innleiðandi umførini í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bussar koyra úr Vestmanna, Sundalagnum, Eiði, Toftum, Strondum og úr Havn. Harafturat siglir strandfaraskipið Sam úr Fuglafirði til Klaksvíkar eftir tær innleiðandi kappingarnar, um nóg stórur áhugi er fyri hesum Serlig atgongumerki til Prixið og ferðaseðil til Sam fáast á Kunningarstovuni í Klaksvík.

Á heimasíðuni hjá Prix Føroyum - www.prix.fo - eru fleiri upplýsingar um ferðasambandið.

# SJÓNVARPIÐ RAÐFESTIR ENDASPURTIN



– Vit fáa tilfarið skjótari út til hyggjararnar við netvarpinum, og vit vita, at okkara málbólkur, sum er tey ungu, brúka nógv internetið. Hinvegin er innihaldið tað sama, sum tað var í sjónvarpssendingunum, og tí fáa fólk tann sama dekningin, men bara á ein annan hátt, sigur Ivan Niclasen, mentanarleiðari í Sjónvarpinum

**– Tá tað snýr seg um skíggjan, hava vit valt at raðfesta hálvfinaluna og finaluna í Prix Føroyum, men samanumtikið halda vit, at dekningurn av kappingini er góður, og at okkara ískoyti er tað sama, sum tað plagdi at vera, sigur Ivan Niclasen, leiðari fyri mentanardeildina í Sjónvarpinum**

SJÓNVARP
*Eyðun Klakstein, eydun@sosialurin.fo*

Prix Føroyar tónleikakappingin hevur í ár ikki verið so sjónlig á sjónvarpsskíggjanum, sum hon plagdi at verða. Vanligt var, at Sjónvarpið gjørdi sendingar frá hvørjum umfari til hyggjararnar kring landið.

Hesaferð er dekningurin øðrvísi. Sjónvarpið hevur sent lítið og einki tilfar í sjónvarpinum, men harafturímóti hevur Sjónvarið framleitt sjónvarpstilfar, sum tað ber til at síggja umvegis internetið – netvarp, tey kalla.

Hetta hevur fingið tónleikarar og onnur at finnast at SvF, tí tað ikki vil gera vanligu sendingarnar um Prixið, men í Sjónvarpinum halda tey, at dekningurin av stóru tónleikakappingini, sum Sjónvarpið sjálvt er við til at fyrireika, er góður.

– Eg skilji tey, sum vilja hava Prix Føroyar á sjónvarpsskíggjan, og tað allarbesta hevði helst verið at sent bæði í sjónvarpinum og á netinum. Men vit hava valt at gjørt tað øðrvísi hesaferð, og eg haldi, at fólk fáa somu tænastuna, sum tey plagdu at fáa, sigur Ivan Niclasen, leiðari fyri mentanardeildina í Sjónvarpinum.

## Skjótari út við tilfari

Sjónvarpið hevur síðani Prix Føroyar tónleikakappingin byrjaði verið sera virkið í kappingini, og øll árini hava tað verið gjørdar sendingar um tey innleiðandi umførini. Hyggjarar hava gjøgnum árini sæð Per Højgaard, Johan í Kollafirði og Trónd Vatnhamar fylgt kappingini.

Sjónvarpið hevur eisini hesaferð upptøkumann og reportara til hvørt innleiðandi umfar í Prix Føroyum, men tilfarið kemur ikki á sjónvarpsskíggjan í sama mun sum áður. Nú verður internetið brúkt til at seta innsløg, prát og tónleik.

– Vit fáa tilfarið skjótari út til hyggjararnar við netvarpinum, og vit vita, at okkara málbólkur, sum er tey ungu, brúka nógv internetið. Hinvegin er innihaldið tað sama, sum tað var í sjónvarpssendingunum, og tí fáa fólk tann sama dekningin, men bara á ein annan hátt, sigur Ivan Niclasen.

– Tølini vísa, at tað eru nógv, sum hyggja eftir netvarpinum, og hetta er við til at geva okkum nakrar áhugaverdar royndir við netvarpi, sum vit kunnu brúka í framtíðini.

## Prixið kemur á skíggjan

Sjónvarpið hevur síðstu vikurnar havt nógv stór tiltøk á skránni, sum eisini hava gjørt tað trupult at gera vanligu Prix-sendingarnar. Fólkatingsvalið og finalur í hondbólti og flogbólti rendu seg beint í Prixið, men leiðarin fyri mentanardeildina hjá Sjónvarpinum leggur tó dent á, at talan er fyrst og fremst um eitt val hjá Sjónvarpinum at dekka kappingina á ein nýggjan hátt.

Prixið kemur tó á skíggjan seinni. Sjónvarpið fer at verða við til hálvfinaluna, sum verður í Trongisvági, og so eisini til stóran finaluna – sum nú verður ein hending, eitt event – har vinnarin í kappingini skal finnast.

– Tá tað snýr seg um skíggjan, hava vit valt at raðfesta hálvfinaluna og finaluna í Prix Føroyum, men samanumtikið halda vit, at dekningurn av kappingini er góður, og at okkara ískoyti er tað sama, sum tað plagdi at vera, sigur Ivan Niclasen.